# Kjak

Sólvit Simonsen



## Politiska tátan

Eg havi við áhuga lurtað eftir, meðan ítróttarhøllin til Sandoynna hevur verið viðgjørd.

Allir flokkar sum ikki unna Sandoynni tað svarta undan neglini, siga at hettar er ein táta fyri Sandoyartunnilin, sum møguliga eisini er satt.

Men tá ið tað kemur til at lata barninum tátuna, minnkar hugurin, ístaðin fyri at lata barninum sukur upp á tátuna.

Eg var sera skuffaður av báðum spýðsunum í Tjóðveldi, eg havi verið meira enn í einum gildi á Sandi saman við teimum. Nú sær man, hvat tungan kann mæla, sjálvt um nakað annað liggur og esjar undir høvuðsskálini. Royndu at andøva ímóti, líka til triðja viðgerð kom fyri, tá koyrdu teir sukur á tátuna, men vit hava lurtað, so vit vita alt!

Báðir teir smáu flokkarnir vísa seg fyri mær, sum teir eru útgjørdir til at gera fortreð. Eg haldi bara ikki, at tað hóskar seg fyri Miðflokkin, teir eru í hvørfall ikki góðir við Sandoynna.

Hvussu hevði verið at sett ein kanningarstjóra at kanna alt tvætlið, teir hava fyri ímóti endanum á hvørjum máli. Hvat kostar arbeiðinum í Tinginum, eg meini, tað er órættvíst at ein flokkur upp á tveir mans skal fáa somu talutíð, sum ein flokkur upp á átta til tíggju mans, har átti tíðin at verið eftir manntalinum.

Eisini haldi eg, at vóru tað teir gomlu hábærisligu sambandsmennirnir, so høvdu teir givið einum manni sum M. Laksafoss, sum bert roynir at arbeiða fyri seg sjálvan, og slett ikki stendur saman við flokkinum, eina uppsøgn upp á grátt pappír.

Soleiðis sum samgongan stóð saman um hetta málið, eigur hon at standa saman um øll síni mál, til gleði fyri alt Føroyaland og eisini fyri okkum í Sandoynni.



**Heðin Mortensen**
*borgarstjóri í Tórshavnar kommunu*

# Kom nú í gongd, Landsverk!

*Ikki óvæntað, kom Landsverk við einum aftursvari, nú kunnað var um týdningin av, at Havnin sum skjótast má fáa ein innkomuveg. Men í svarinum, sum kom frá Heina Eysturoy, leiðara á Vegadeildini, skein ígjøgnum, at talan veruliga er um tvørrandi vilja frá Landsverki, tá tað snýr seg um at finna høvuðsstaðnum eina nøktandi loysn.*

Tvørturímóti gongur greitt fram av aftursvarinum, at Landsverk als ikki er sinnað at samstarva, men bara vil arbeiða eftir egnum vilja. Niðurstøðan í aftursvarinum er, at um Tórshavnar kommuna ikki leggur seg undir hugsanina hjá Landsverki, so verður eingin nýggjur innkomuvegur. Tað hevur eisini víst seg at vera so í verki, tí Landsverk hevur jú steðgað arbeiðinum!

Samstundis er Landsverk til reiðar at brúka eina avoldaða landsvegalóg sum jarnbrot, fyri at fáa júst sína loysn ígjøgnum. Landsverk hevur bílagt eina frágreiðing við »teimum røttu niðurstøðunum«, og við avtalubroti hevur stovnurin síðani syrgt fyri, at onnur sjónarmið ikki sleppa framat, tí Landsverk hevur noktað Tórshavnar kommunu at gjørt viðmerkingar til frágreiðingina, hóast ein greið avtala var um hetta frammanundan. So langt vil Landsverk ganga, bara fyri at fáa sítt ígjøgnum fyri ein og hvønn prís!

### Neyðugt at kæra

Og hóast uttanveltaðir ferðsluserfrøðingar frá Rambøll & Nyvig hava víst á, at vegaloysnin hjá Landsverki er ikki nøktandi, hevur Landsverk niðurgjørt og mistonkiliggjørt hesa serfrøði, so kommunan ikki hevur havt annað val, enn at kæra Landsverk til Innlendismálaráðið.

Hesa frágreiðing mátti Tórshavnar kommuna taka stig til, tí Landsverk ikki var sinnað at lurta eftir fakligu sjónarmiðjunum hjá Tórshavnar kommunu. Niðurstøðan hjá Rambøll & Nyvig var, at ætlanin hjá Landsverki í verandi líki ikki er til gagns fyri høvuðsstaðin, og at ferðslutrygdin ikki er líka góð sum í teimum loysnum, kommunan hevur ynskt og mælt til. Tað skal eisini meira enn góður vilji til at skilja og góðtaka, at ein vegur við 80 kilometra hámarksferð ígjøgnum bygt øki er ein ferðslutrygg loysn!

At Landsverk heldur seg kunna gera, sum tað passar stovninum, eru eisini onnur dømi um. Landsverk og Vegadeildin framdu í 2007 tilvitað brot á bæði byggilóggávu og serstaka byggisamtykt, tá farið var undir vegagerð á fløtuni í Hoydølum – uttan loyvi, sjálvandi – so Innlendismálaráðið mátti buka stovnin upp á pláss. Enn hevur Landsverk ikki ruddað upp eftir sær har, hóast stovnurin hevur fingið greið boð um tað...

Fleiri onnur dømi eru um mál, har leiðslan á Landsverki og Vegadeildini hjá sama stovni uttan fyrisitingarliga sakligar grundgevingar hava lagt fótonglar fyri byggiætlanir, ferðslutrygdartiltøk og menning í høvuðsstaðarøkinum.

### Ósannindi um steðg

Heini Eysturoy sigur, at borgarstjórin steðgaði arbeiðinum við innkomuvegnum, men tað er ikki satt. Eitt samt Tórshavnar býráð sendi í mai 2008 Landsverki og Innlendismálaráðnum eina samtykt í 20 punktum, samstundis sum biðið var um, at Landsverk arbeiddi upp á innkomuvegin norðureftir, meðan viðurskifti viðvíkjandi linjuføringum og íbindingum suður ímóti Krákugjógv blivu kannað.

Men eftir tilráðing frá Landsverki valdi landsstýrið ikki at taka hesa samtykt til eftirtektar, so arbeiðið kundi halda fram, men valdi í staðin at steðga vegagerðini og síðani at strika játtanina til arbeiðið.

Heldur ikki er tað rætt, at tað, sum higartil er gjørt av innkomuvegnum, er gjørt í samstarvi við Tórshavnar kommunu. Tvørturímóti hevur Landsverk havnað óteljandi umbønum frá kommununi um samstarv.

Tíverri hevur verið gjøgnumgangandi fyri hetta mál, at Landsverk ikki hevur rætt hond frá síðu, men hevur súltað allar seriøsar royndir at koma víðari og fáa framt eina loysn, ið gerst alt meira átroðkandi fyri hvønn dag, sum gongur.

Til dømis var í januar 2007 á fundi hjá kommununi avtalað, at Landsverk skuldi gera eina kost/nyttu-kanning av tunli frá Krákugjógv vestur ímóti Hotel Føroyum, men hóast trý ár eru liðin, hevur Landsverk framvegis einki gjørt av tí, sum tá var avtalað.

### Altíð betrivitandi

Í aftursvari sínum roynir Heini Eysturoy at skylda uppá, at málið hevur verið tarnað av, at skiftandi embætisfólk, borgarstjórar og býráðssamgongur hava vilja sett síni fingramerki á nýggja innkomuvegin. Men skuldi so verið, so kann væl tað sama sigast um skiftandi stjórar og deildarleiðarar á Landsverki.

Longu í 1984-86 arbeiddu kommunan og táverandi leiðsla í Landsverki tætt saman um hesa vegagerð, og í fullari semju var gjørd ein ætlan við ikki færri enn fýra íbindingum á teinunum frá Sandvíkahjalla til Oyggjarvegin. Ætlanin er lýst í bóklinginum »Havnin í framtíðini«.

Øll árini hevur Tórshavnar kommuna verið til reiðar at hildið seg til meginreglurnar í hesi ætlan, men torført er at koma ígjøgnum, tá núverandi leiðsla á Landsverki við hond og fót stríðist ímóti tí, sum undanmenn teirra í leiðsluni hjá Landsverki hildu vera eina góða loysn. Kanska er hetta so, tí nýggja leiðslan altíð heldur seg vitað betur enn øll onnur?

Sum sæst, hevur Tórshavnar kommuna stak vánaligar royndir av at gera avtalur við Landsverk, tí alt ov ofta verða tær als ikki hildnar, men bara ignoreraðar, sum vóru tær slett ikki til. Men her skal verða sligið fast, at Landsverk ikki longur skal sleppa at skalta og valta við ferðsluviðurskiftunum í Tórshavn!

### Luktar av politikki

Núverandi leiðsla í Tórshavnar býráð hevur longu fyri fleiri árum síðani boðað Landsverki frá, at stovnurin ikki longur uttan mið og mál sleppur at fremja tilvildarligar og óbrúkiligar vegaloysnir inn í høvuðsstaðin. Serfrøðin hevur longu staðfest, at loysnin hjá Landsverki í hesum ítøkiliga máli er nøktandi fyri býin

So kann Landsverk keypa sær so nógvar frágreiðingar og niðurstøður aftrat, sum stovnurin vil, tí tað verður ikki við núverandi leiðslu í Tórshavnar býráð, at nýggi innkomuvegurin bara skal standa sum ein óynsktur varði fyri Landsverk, ið verður smoygdur niður yvir høvdið á borgarunum. Nýggi innkomuvegurin skal gagna høvuðsstaðnum og verða ein varandi loysn á landsins størsta ferðslutrupulleika – hvørki meira ella minni!.

Annars er at siga, at aftursvarið frá Heina Eysturoy luktar langan veg av politikki, tá hann heldur, at borgarar í høvuðsstaðarøkinum ikki hava líka góðan rætt til almennar tunnlar í høvuðsstaðarøkinum, sum aðrastaðni kring landið. Men við allari virðing fyri hansara førleikum annars, so er politikkur altso ikki hansara arbeiðsøki! Sum almennur deildarleiðari á vegaøkinum skal hann halda seg til sítt arbeiði, og honum nýtist ikki at bíða eftir Tórshavnar kommunu fyri at sleppa í gongd.

**Øll árini hevur Tórshavnar kommuna verið til reiðar at hildið seg til meginreglurnar í hesi ætlan, men torført er at koma ígjøgnum, tá núverandi leiðsla á Landsverki við hond og fót stríðist ímóti**